Búskapur og vinna:

## Yvirskot í 2005

Nú er loksins líkt til, at fólk eru farin at nýta brúnna um Oysasund. Felagið, sum eigur brúnna, sigur, at í dag eru inntøkurnar størri, enn roknað varð við, at felagið gjørdi sína framrokning av rakstrinum. Tað fer eisini at síggjast aftur. Eftir teimum upprunaligu framrokningunum skuldi raksturin geva avlop í 2007, men við teirri veksandi ferðsluni í seinastuni fer raksturin at geva avlop longu í 2005, sigur brúgvarfelagið.

Men útlitini eru kortini svikalig. Í teimum fíggjarligu framrokningunum er roknað við, at brúgvarfelagið skal rinda fýra prosent í rentu av fíggingini, og fíggjarserfrøðingar ivast í, um hesin parturin av metingini er at halda. Fer realrentan upp um tey fýra prosentini, kann tað skjótt kosta brúgvarfelagnum dýrt, siga serfrøð-ingarnir. Ov stór rentuhækking fer at noyða felagið at krevja meiri pengar frá teimum, sum nýta brúnna, og eitt tílíkt stig kann skjótt bíta seg í halan.

## Lønarhækking kostar

Stjórin í norska tjóðbankanum, Svein Gjedrem, ávarar nú um, at tann stóra lønarhækkingin á landsins arbeiðsmarknaði fer at kosta arbeiðspláss, samstundis sum lønarvøksturin fer at bera í sær, at rentan fer at hækka.

Norskir bankar hava í seinastuni sagt seg vænta, at rentan fer at hækka eitt prosent í summar og eitt hálvt prosent afturat seinni. Hesum gevur tjóðbankastjórin teimum nú rætt í.

Svein Gjedrem vísir á, at lønarvøksturin hevur verið millum fimm og sjey prosent um árið tey seinastu árini. Hetta fer sambært bankastjóranum at kosta nógv arbeiðspláss, og tað fer afturat hava við sær, at trýstið á tær almennu forsorgarskipanirnar fer at veksa, sigur tjóðbankastjórin.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Ísrael girðir seg inni



*Ísraelskt hernaðarakfar á markinum millum Ísrael og Vestara Áarbakka tætt við flóttafólkaleguna Jenin*

*Mynd: Reuters*

**Ísrael fór í gjár undir at seta eina umstrídda girðing upp á Vestara Áarbakka**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Ísraelsmenn fóru í gjár undir at seta eina girðing upp á Vestara Áarbakka. Myndugleikarnir siga, at girðingin er neyðug fyri at steðga teimum áhaldandi palestinsku sjálvmorðsbumbuatsóknunum.

Ísraelski verjumálaráðharrin, Benyamin Ben Eliezer, var hjástaddur, tá arbeiðið byrjaði í gjár. Hann hevur leingi talað fyri at girða Vestara Áarbakka av.

Palestinareru í øðini um girðingina, men heldur ikki allir ísraelsmenn eru líka fegnir um hana. Nógvir høgrasinnaðir ísraelsmenn halda, at girðingin kann gerast eitt komandi mark millum Ísrael og eitt palestinskt ríki, og teir hava tí mótmælt avgerðini hjá myndugleikunum.

Summir eygleiðarar í Miðeystri siga, at girðingin fer ikki athava nakra ávirkan, tí hon fer ikki at forða palestinum at gera álop á mál í Ísrael. Aðrir eygleiðarar halda, at girðingin fer at økja spenningin millum ísraelsmenn og palestinar, júst sum bíðað verður eftir einum amerikanskum friðaruppskoti.

# Valið í Kekkia flytir landið nærri ES

**Sosialdemokratarnir, sum vilja hava Kekkia upp í ES, vunnu tjóðartingsvalið um vikuskiftið**

KEKKIA
*Árni Joensen*

Kekkia tók um vikuskiftið eitt stórt stig nærri ES, tá sosialdemokratiski flokkurin vann tjóðartingsvalið í landinum. Flokkurin fekk 30,2 prosent av atkvøðunum og fer ætlandi at skipa samgongu saman við teirri liberalu valsamgonguni, sum fekk 14,3 prosent. Teir báðir flokkarnir hava 101 av teimum 200 tingsessunum.

Formaðurin í sosialdemokratiska flokkinum, Vladimir Spidla, er heitur talsmaður fyri kekkiskum limaskapi í ES, og eygleiðarar halda, at hann fer at gera alt, sum gerast kann, fyri at sannføra Bruxelles um, at Kekkia er búgvið til limaskapin, og at kekkiska fólkið tekur undir við tí. Ein meiningakanning hevur eisini víst, at flestu kekkar vilja sleppa upp í ES.

Annars vænta kekkar ikki tær nógvu politisku broytingarnar, nú sosialdemokratarnir taka við.

Tað tykist tó hava skelkað nógv fólk í Kekkia, at tann gamli kommunistaflokkurin fekk næstan 20 prosent av atkvøunum á tjóðartingsvalinum.

# Skógarvørður setti eld á

**FBI skuldsetir ein skógarvørð fyri at kynt tann stóra skógareldin í Colorado**

Amerikanska samveldisløgreglan FBI skuldsetti í gjár eina 38 ára gamla kvinnu fyri at hava kynt eldin, sum var byrjanin til tann stóra skógareldsin í statinum Colorado. Kvinnan arbeiddi sjálv sum skógarvørður.

Myndugleikarnir siga, at verður kvinnan funnin sek, kann hon fáa upp í tíggju ára fongsul umframt eina hálva millión dollarar í bót.

Sambært FBI var tað tann 38 ára gamla kvinnan, sum boðaði frá skógareldinum. Hon segði seg vera komna fram á eitt legubál, sum hon ikki var før fyri at sløkkja. Men undir avhoyringum hevur hon broytt frágreiðing.

Úr Norðurlondum:

## 15 bygdir afturat

Fyri at ein kommuna í Danmark kann kalla seg bý, skulu minst 200 fólk búgva har. Men í Danmark sum so nógva aðrastaðni flyta fólk til tey størru plássini, og tað hevði við sær, at á nýggjárinum mistu 15 kommunur býarheitið. Gamla orðið "bygd" verður ikki nýtt í Danmark, og í almennum høpi eita bygdirnar tískil "samlet bebyggelse".

## Aðra kvotuskipan

Norsku myndugleikarnir umhugsa nú at broyta kvotuskipanina fyri laksaveiði í teimum norsku áunum. Sum er kunnu fólk fiska eitt ávíst tal av laksum um dagin, men nú er ætlanin at seta eina kvotu fyri summarið heldur enn dagkvotu.

Myndugleikarnir, sum umsita laksaveiðina í áunum, siga, at verður ikki okkurt gjørt, er vandi fyri, at laksurin kemur í vanda. Víst verður á, at hetta er hent fyrr. Tey, sum fiska laks í áunum, halda ikki, at nakað er at stúra fyri, og tey eru eisini ímóti ætlaðu kvotubroytingunum.

## Einki prát um lýðveldi

Leiðslurnar í teimum politisku flokkunum í Noregi hava gjørt av, at flokkarnir skulu ikki tosa meiri um at skipa Noreg sum lýðveldi heldur enn kongsveldi. Orðaskiftið um at skipa landið sum lýðveldi tók rættiliga dyk á seg seinasta summar. Fleiri vóru misnøgd við avgerðina hjá Hákuni krúnprinsi at velja sær Mette Martit til komandi drotning.

Fleiri politikarar tóku tá undir við tankanum um at skipa Noreg sum lýðveldi. Einastu flokkar, sum ikki tóku undir við hugskotinum, vóru Høgri og Sosialistiski Vinstriflokkurin.

Men nú hava floksleiðslurnar gjørt av at sleppa hugskotinum. Avgerðin varð tikin á einum fundi millum stórtingsformannin, Kirsti Kolle Grøndahl, og formenninar í flokkunum.

ítróttur

Nr. 113 • týsdagur • 18. juni 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Eystanstevnan:

**Nógvur kappróður í blaðnum í morgin**

# Eingin venjari



*Í FSF vóru tey fegin, tá Henrik Larsen gjørdist leysur av sáttmálanum við Ølstykke, men enn hevur hetta so ikki havt við sær, at hann hevur sæð nakran føroyskan dyst, soleiðis sum ætlanin annars tóktist vera*

**Hóast hann nú er leysur av sáttmálanum við Ølstykke, og hóast hann í farnu viku hevði møguleika at hyggja at í øllum førum trimum dystum í føroysku kappingini, so hevur Henrik Larsen ikki sýnt stórvegis áhuga fyri hesum, og komandi tríggjar vikurnar verður hann í feriu**

LANDSLIÐSVENJARI
*Jákup Mørk*

Spenningur var stórur, tá FSF fyri góðum mánaði síðani kundi avdúka, at Henrik Larsen varð settur í starv sum nýggjur landsliðsvenjari.

Fatanirnar um starvssetanina vóru sum vera man ymiskar, men hvussu var og ikki, so var spenningurin um hetta framvegis stórur.

Tað vóru fleiri, sum funnust at, at nýggi venjarin ikki kundi koma í starvið fyrr enn 1. juli, tá sáttmáli hansar við Ølstykke rann út, men har var tó ein møguleiki fyri, at venjarin kortini kundi koma til Føroyar áðrenn hetta.

Tað var nevnliga so, at nevndin í Ølstykke hevði góðtikið, at um so var, at Ølstykke tryggjaði sær uppflyting áðrenn seinasta leikdag, so vildu teir leysgeva venjaran, og tí mundi lagið í FSF-húsinum ikki vera heilt av leið, tá Henrik Larsen og hansara menn fyri tveimum vikum síðani vissaðu sær sessin í 1. deild. Nú var »Stóri« leysur, soleiðis at hann kundi fara undir nýggja yrkið. Tað var so í øllum førum tað, sum roknað varð við.

### Farin í feriu

Vanliga fatanin millum manna var helst, at nú nýggi venjarin var leysur av fyrrverandi starvinum, mundi hann alt fyri eitt fara at kunna seg um umstøðurnar, sum hann skal virka undir komandi árini. Eitt nú við at hyggja at dystum, hitta hjálparvenjaran á máli og kanska eisini fáa ein fund við føroysku venjararnar, soleiðis sum Allan Simonsen plagdi at gera.

Eitt upplagt høvi til hetta mundi vera farna vikan, har tað umframt dystirnar í landskappingini eisini skuldu spælast hálvfinalur í steypakappingini. Við hesum kundi venjarin í tíðarskeiðnum frá hósdag til sunnudag sæð einar tríggjar dystir, har møgulig evni til landsliðið kundi fingið skoðsmál, umframt at hann eisini kundi kunnað seg við aðrar umstøður her hjá okkum.

Høvdu fólk roknað við hesum, so eru tey tó vónbrotin í dag. Tí enn hevur eingin landsliðsvenjari verið at sæð nakra staðni.

Vit royndu mánadagin at fregnast á skrivstovuni hjá FSF, fyri at vita, hvørt landsliðsvenjarin ikki ætlaði sær upp hesumegin summarfrítíðina. Ísak Mikladal, aðalskrivari hjá FSF, sigur um hetta, at teir hava verið í samband við Henrik Larsen, eftir at uppflytingin varð tryggjað, men at tað so ikki verður her og nú, at hann kemur til Føroya.

– Vit greiddu honum frá, at hann hevði møguleika at síggja tríggjar dystir, um so var, at hann var her í tíðarskeiðnum frá 12. til 16. juni, men hetta lá so ikki fyri hjá honum.

– Henrik Larsen hevur eisini boðað frá, at hann rrá 20. juni og komandi tríggjar vikurnar verður í summarfrí, so væntandi kemur hann fyri fyrstu ferð á vitjan, tá B36 antin 17. ella 24. juli skal spæla í europeisku kappingini fyri meistarar, umframt at hann eisini hevur møguleika at síggja finaluna um Løgmanssteypið, áðrenn seinna kappingarhálva byrjar, sigur Ísak Mikladal.

### Óheppið

Tað er sum kunnugt bert ein mánaður síðani, at nýggi venjarin varð settur í starvið, og tí er kanska nakað tíðliga at gera nakra niðurstøðu um, hvussu hetta fer at hepnast.

Men tað er eingin loyna, at eitt av størstu kritikpunktunum, sum Allan Simonsen fekk frá fólkum í føroysku fótbóltsheiminum, var, at hann var ov sjáldan í Føroyum, og tískil hevði alt ov fáar møguleikar at kunna seg um venjingarstøðuna hjá landsliðsleikarunum og møguliga eisini at kunna seg um nýggj landsliðsevni.

Við setanini av Henrik Larsen varð ført fram, at nýggi venjarin væntandi fór at vera meira í Føroyum, og tískil má tað metast sum verandi rættiliga óheppið, at hann ikki tykist sýna stórvegis áhuga fyri føroysku kappingini. Ikki minst tá hann verður burturstaddur frá 20. juni at rokna, og tí ikki hevur møguleika at hyggja at teimum báðum seinastu umførunum undan steðginum.

Fyrsta uppgávan hjá Henrik Larsen í sessinum sum føroyskur landsliðsvenjari verður annars 21. august,tá Føroyar skulu spæla móti Liktenstein. 7. september kemur Skotland á vitjan og í døgunum 10. og 16. oktober spælir føroyska landsliðið á útivølli móti ávíkavist Litava og Skotlandi.

Við starvssetanini segði Henrik Larsen, at Føroyar í øllum førum skulu hava eins nógv stig, sum vit fingu seinast (sjey), og skal hetta halda, er í øllum førum neyðugt at vera so væl fyrireikaður, sum til ber.